HOFF STOFF

# Sjúkrahúsið og Tjarnargarður



***Myndin til vinstru***
*11 ára gamla Kirstin í Garði handaði drotningini eitt blómutyssi úti á sjúkrahúsinum. Hon var ógvuliga spent, sum skilligt var, og hon hevði eisini vant seg, áðrenn hon kom. – Eg skal siga »velkommen« við hana, og geva henni blómstur, greiddi Kirstin frá. Hon var ikki í skúla mánamorgunin, tí hon hevði í staðin pyntað seg fyri drotningini. Og hon var eisini ógvuliga fín.*

***Myndin niðanfyri***
*Starvsfólkini á sjúkrahúsinum vóru ógvuliga spent til vitjanina, og allastaðni hoyrdist fnis og flenn av sjúkrasystrum, sum gleddu seg at møta Hennara Hátign. – Tað hevru verið nógv tosað um drotningavitjanina seinastu tíðina. Tey flestu eru ógvuliga spent, men summi eru ímóti, sum vera man, sigur Gretha, sum er deildarleiðari á G1. Frá vinstru síggjast Erla, Óluva, Cecilia og Gretha.*



*Orð Eydna Skaale*
*Myndir: Bárður Lydersen*

Eftir seina morgunmatin í Müllers pakkhúsi fóru Drotning Margretha og Hendrikur prinsur út at hyggja at nýggja partinum av Landssjúkrahúsið, og hitta onkrar sjúklingar har.

Á Tjarnargarði hitti regentparið bæði gomul fólk og børn. Børnini, sum ganga í barnagarðinum á Konmansmýru vóru komin yvir um vegin, og veottraðu við føroyskum fløggum, sum tey sjálvi høvdu teknað.



## – Hetta vardi okkum ikki í morgun

Mia og Jóan Magnus ella Helle, sum hann vanliga verður róptur, Justinussen úr Leirvík, komu til Havnar á sjúkrahúsið mánamorgunin.

– Nei, lítið vistu vit, tá vit fóru úr Leirvík í morgun, at vit skuldu taka í hond á drotningini, søgdu tey bæði, eftir fínu vitjanina inni á stovuni. Men tey hildu tað tó vera eina serstaka og minnisríka uppliving.

– Hetta er so fyrstu ferð eg havi heilsað uppá drotningina, men eg haldi, at hon virkar bara fitt, segði Mia, sum tó var eitt sindur flóv av at hava sitið niðri, ímeðan drotningin var og heilsaði uppá. – Tey søgdu við okkum, at okkum nýttist ikki at reisa okkum upp, men tað tóktiskt løgið at sita á aftirpartinum, tá drotningin kom inn, helt Mia.

Umframt at taka í hond á drotningini og prinsinum, heilsaðu Mia og Helle eisini uppá løgmann og borgarstjóran í Havn, sum gingu aftaná drotningini og eisini tóku í hond á sjúklingunum.

– Tá vit komu í morgun fingu vit at vita, at drotningin fór at koma í dag. Tey søgdu við okkum, at vit skuldu bara sita her, so skuldu tey vísa drotningini inn higar at heilsa uppá okkum. Og her hava vit so sitið og bíðað í allan morgun, greiddu tey frá.

Men tey vóru samd um, at tey nú høvdu okkurt at fortelja leirvíkingum, tá tey komu heimaftur.



*Her kemur regentparið inn í Tjarnargarð, saman við løgmanni og borgarstjóranum. Leiðarin, varaleiðarin og Katrin Dahl Jakobsen taka ímóti. Margretha drotning spurdi um blómurnar og havan, sum enn ikki hava havt bestu umstøður í kalda og turra veðrinum.*

## – Hon hevur onga krúnu!

– Vit hava sæð drotningina, og hon eitur Margretha. Vit hava eisini sæð prinsin og fleiri politimenn, greiddu dreingirnir, sum ganga á stovuni »Túgvan« mær frá.
– Eg haldi ikki, at hatta er ein rættilig drotning, tí hon hevur onga kongakrúnu og ongan kjóla. Men tað er kanska tí, at tað er so nógvur vindur í dag. Kongakrúnan hevði bara fokið við vindinum, helt onkur.

– Men hon hevur heldur ongan kong, staðfesti ein.

– Vit skuldu standa her, og tá drotningin kom framvið, skuldu vit flagga, og so vinkaði hon aftur. Men prinsurin vinkaði ikki, greiddi ein av dreingjunum mær frá. – Og prinsurin hevði heldur onga kongakrúnu.

Høvdu tit tímað at verið prinsar?
– Ja, eg hevði væl tímað. Tí teir eiga fult av pengum, kanska 1000, og nógvar diamantar, vóru allir dreingirnir samdir um.
Men hvat gera prinsar?
– Prinsar? Teir gera einki. Teir skulu bara akta drotningina, og gera sum hon sigur, staðfesti ein, eftir at hava hugsað seg um eina løtu.

